Nr. 81/2019

Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur viðvíkjandi bíðitíðum í psykiatriini, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu er aktuella støðan viðvíkjandi bíðitíðum í psykiatriini?
2. Hvussu er aktuella støðan viðvíkjandi bíðitíðum til útgreinan fyri ADHD og autismu?
3. Kunnu vit vænta, at serligu umstøðurnar í.s.v. Koronusmittuna ávirka bíðitíðirnar í psykitatriini?
4. Og um so er, hvussu nógv kunnu fólk vænta, at bíðitíðirnar verða longdar?

Viðmerkingar:
Við Koronusmittuni varð gerandisdagurin hjá flestu okkara kollveltur. Hetta hevur ávirkað stórar partar av samfelagnum, og nógv okkara liva í óvissu um framtíðina. Bæði í heilsu- og almannaverkinum hava vit seinastu árini havt avbjóðingar við longum bíðilistum. Nú henda serliga støðan er íkomin, eru tað fleiri, sum stúra fyri, at bíðitíðirnar gerast enn longri. Hetta er til dømis galdandi fyri foreldur at børnum, sum skulu útgreinast fyri serligar avbjóðar so sum ADHD og/ella autismu.

Ynskiligt er, at landsstýrismaðurin greiðir frá, hvussu serliga støðan ávirkar hesi viðurskifti. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 7. mai 2020

Jóhannis Joensen